


*Vónandi kunnu vit í góðum samstarvi Tórshavnar kommunu og Vinnumálaráðið gera tað liviligt hjá teimum, sum liva av at koyra hýruvogn, sigur Magnus Fuglø, formaður í Aksturvinnufelagnum Samfylking*

Aksturvinnufelagið Samfylking:

# Hýruvognsreglugerðin má endurskoðast

**Nevndin í Aksturvinnufelagnum Samfylking harmast um at hýruvognsvinnan ongan góðan eigur, og at myndugleikarnir ikki hjálpa teimum at fáa skipaði viðurskifti, soleiðis at tað ber til at liva av at koyra hýruvogn í Tórshavnar kommunu, sigur Magnus Fuglø, formaður í felagnum**

HÝRUVOGNAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hýruvognsvinnan hevur tað ikki lætt í Tórshavnar kommunu, sigur Magnus Fuglø, formaður í aksturvinnufelagnum Samfylking. Talan er um eina vinna burturav, sum góðar 60 familjur í kommununi skulu liva av.

Ringt er hjá einum hýruvognsførara at fáa endarnar at røkka saman, hóast hann hevur langar arbeiðsdagar allar yrkadagarnar í vikunu. Hann er eisini noyddur at hava bilin koyrandi um næturnar í vikuskiftinum, tá fólk fara í býin og nýta nógv hýruvogn.

Men her hava hýruvognarnir fingið kapping frá fleiri minibussum, sum við ongum hýruvognsloyvi í vikuskiftinum taka ein stóran part av kundunum frá hýruvognunum.

Fyri at koyra hýruvognskoyring í Havn, skalt tú hava loyvi frá hýruvognsnevndini hjá Tórshavnar býráð. Loyvið umfatar koyring við upp til 8 ferðandi.

## Hýruvognsreglugerðin ikki galdandi

Fyri nøkrum árum síðan fann onkur út av, at um man fekk sær ein minibuss, sum tók meira enn 8 ferðandi, so var hýruvognsreglugerðin ikki galdandi fyri teir.

Har var altso ein grá sona í hýruvognsreglugerðini, sum gjørdi at hesir minibussar kundu koyra ótarnaðir.

Hetta førdi síðan við sær at fleiri minibussar komu á gøtuna og komu inn á økið hjá hýruvognunum, serliga í vikuskiftinum, og nýta t.d. steðgiplássini í Steinatúni, sum hýruvognarnir eiga, eftir at býbussarnir eru givnir á miðnátt.

Magnus Fuglø sigur, at teir kunnu ikki forða fyri hesum piratbussum, men teir hava ikki loyvi at koma inn á økið hjá hýruvognum og taka kundar frá teimum.

Nevndin í Samfylking hevur havt nógvar fundir við fútan, Vinnumálaráðið og hýruvognsnevndina hjá býráðnum um hesa piratkoyringina.

Tað vísir seg at sum at hýruvognsvinnan eigur ongan góðan, og at myndugleikarnir ikki klára at hjálpa okkum við at fáa skipaði viðurskifti at arbeiða undir, sigur Magnus Fuglø.

Hann nevnir sum dømi, at fyri nøkrum árum síðan høvdu hýruvognsførarar í Bergen somu trupulleikar at stríðast við, men tað var skjótt, at myndugleikarnir fingu tað í rætt lag.

Magnus sigur víðari, at teir hava heitt á Vinnumálaráðið um at fáa hýruvognsreglugerðina fyri Tórshavnar kommunu endurskoðaða. Reglugerðin hevur 20 ár á baki og er ikki tíðarhóskandi í dag.

2. desember í fjør fekk Samfylking bræv frá Vinnumálaráðnum um, at ein arbeiðsbólkur skuldi setast til at endurskoða reglugerðina, men longu 6. desember slitnaði samgongan, og alt datt niðurfyri.

## Steðgipláss til hýruvognar

Ein annað átrokandi mál sum Asturvinnufelagið Samfylking arbeiðir við, er at alt ov fá steðgipláss eru til hýruvognar í býnum. Á Vaglinum eru trý, og uttan fyri SMS eru tvey, sum eru sera væl fjald fyri fólki, sum koma út hiðani.

Vit kundu hugsað okkum at t.d. tvey steðgipláss vóru við hvørja av teimum trimum høvuðsinngongdunum í SMS og aðrastaðni í býnum, har nógv fólk koma og fara, sigur Magnus Fuglø.

Tað eru umleið 60 hýruvognsloyvir í Tórshavnar kommunu, og tað halda vit vera meira en nokk. Vónandi kunnu vit í góðum samstarvi Tórshavnar kommunu og Vinnumálaráðið gera tað liviligt hjá teimum, sum liva av at koyra hýruvogn, og at borgararnir í høvuðsstaðnum fáa eina góða tænastu alt samdøgrið og hvønn dag í vikuni, sigur Magnus Fuglø.

# ítróttur

Nr. 202 • fríggjadagur • 22. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Stjørnan á Televarpið

**Eftir ætlan verða heimadystirnir hjá Stjørnuni framyvir vístir á Televarpinum sama kvøld,sum teir eru leiktir. Fyrsti dysturin skal ætlandi vísast sunnukvøldið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tey eru ikki bangin fyri at royna nakað nýtt í Klaksvík. Tað hevur næst størsti býurin í landinum prógvað ferð eftir ferð, og nú bróta tey enn einaferð upp úr nýggjum.

Saman við Televarpinum fer hondbóltsfelagið Stjørnan nevnliga undir eina roynd, og ætlanin við hesum er, at tað framyvir skal bera til at síggja heimadystirnar hjá felagnum á sjónvarpi sama dag, sum teir eru leiktir.

## Ein roynd

Fyrstkomandi heimadysturin hjá Stjørnuni verður sunnudagin móti Neistanum. Dysturin verður leiktur kl. 15.00, og longu kl. 20 er so ætlanin, at hyggjarar hjá Televarpinum kunnu sessast við skíggjan at vita, hvussu leikur fór. Ella fyri at finna fram onkra detalju í dystinum, sum eyguni ikki fangaðu heilt í høllini.

Stjóri Televarpinum er Laila Hentze, og tó at hon ikki heilt vil staðfesta, at tað verður sent, so tykjast tað í løtuni bert vera smálutir, sum resta at fáa upp á pláss.

– Enn er alt tað tekniska ikki heilt greitt, og aðrar smálutir resta eisini í, áðrenn hetta er endaliga upp á pláss, men tað er so ætlanin at gera eina roynd, sigur hon.

– Og talan er um eina roynd. Vit hava ikki roynt slíkar sendingar áður, so enn havi eg ikki hug at blása hetta alt ov stórt upp, sigur stjórin á Televarpinum.

## Framúr møguleiki

Hinvegin tykjast tey í Stjørnuni at vera meira reyst í málinum í so máta. Og tað er helst einki at ivast í, at gongur alt eftir ætlan, so kann hetta vera við at profilera helst sterkasta kvinnuliðið í landinum enn meira.

– Hetta er ein framúr góður møguleiki hjá okkum at profilera felagið, sigur Rógvi Nielsen, sum umframt at venja besta kvinnuliðið eisini hevur ítróttarligu ábyrgdina í felagnum.

– Vit rokna við, at øll teknisk viðurskifti verða fingin í rættlag til sunnudagin. Samstundis, sum dysturin verður festur á band, verður hann goymdur á einum harðdiski, og so fær Televarpið talgildaðu útgávuna av dystinum. Sendiútgerðin hjá teimum er ikki analog, og tí er hesin framgangshátturin neyðugur, men vit rokna ikki við, at hetta fer at geva nakrar trupulleikar, sigur Rógvi.

Víðari sigur hann, at tey miðja eftir, at dygdin av upptøkunum skal verða á so høgum støði, sum tað yvirhøvur er gjørligt, nú talan er um amatør-upptøkur. Eisini hevur felagið fingið fatur á speakara til dystin. Tað verður Karl Johansen, sum í nógv ár leikti á besta liði felagsins.



*Sunnukvøldið kunnu hyggjarar hjá Televarpinum ætlandi sessast framman fyri skíggjan til hondbóltsdyst. Fyrsti dysturin verður tann millum Stjørnuna og Neistan*

## Fíggjarligir fyrimunir

Hvørgin parturin fæst at siga nakað um fíggjarliga partin av avtaluni. Men tað er lítið at ivast í, at hjá báðum pørtum eru fíggjarligu møguleikarnir í hesum stórir. Stjørnan fær á hendan hátt ein – eftir føroyskum standardum – einastandandi møguleika at profilera felagið, og skuldi hetta sostatt skapt góð gróðrarlíkindi fyri øktum sponsorinntøkum framyivr.

Og hjá Televarpinum er hetta uttan iva enn eitt stig at økja um innihaldið á Rás1, sum fyritøkan rekur sjálv. Her eru frammanundan tíðindi, húsamarknaður, veður og valuta at síggja. Og hartil, so er hetta helst eisini ein háttur at draga lýsarar at Televarpinum.



Hvar ert tú?

Tú hevur áræði og ert ágrýtin og opin.

Passar tú inn í hesa myndina, átti tú at søkt lærlingapláss hjá okkum.

Tú hevur HH, HF ella studentsprógv, og tað er ein fortreyt, at tú situr væl um sátt við telduna.

Uppgávurnar eru mangar, og tú kemur runt á øllum stovninum. Bæði í fyrisitingini, arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini fært tú møguleika at royna teg.

Tú kemur at hava nógv samband við viðskiftafólk okkara, og krevur tað, at tú dugir væl at samskifta við fólk.

Verður tú skrivstovulærlingur hjá ALS, lova vit tær eina fjøltáttaða útbúgving og hollar royndir, sum tú kanst brúka víðari á tíni ferð gjøgnum lívið.

Løn sambært sáttmála millum S & K og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Umsóknarfreistin er mánadagin 25. oktober og tú kanst byrja skjótast tilber. Meira fæst at vita við at venda tær til Elisabeth O. Gaardbo á tel. 349550.

ALS

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 18 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.

Arbeiðsloysisskipanin
Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo

SANSIR TEL 355 355